# Ein fjøður í hattin

JÓNLEIF JOHANNESEN
Klaksvík



**At lesa tíðindaskrivið frá Mentamálaráðnum kendist sum ein síður. Broytingarnar, ið framdar eru, skapa dygd í fólkaskúlanum**

**Tvílæraraskipanin**
At seta í verk eina tvílæraraskipan í yngru flokkunum er eitt stak skilagott átak. Tað er ein sannroynd, at skiftið frá barnagarði til fólkaskúlan mangan kennist ógvusligt fyri børnini. Við eini tvílæraraskipan fáa lærararnir í yngru flokkunum betri møguleika at geva eina fjølbroytta gevandi undirvísing. Við tvílæraraskipanini fáa lærararnir eisini tikið hædd fyri teimum næmingum, sum enn ikki eru útviklaðir til stirvna flokksundirvísing. Lærararnir fáa betri tikið útgangsstøðið í næmingunum. Harnæst gevur tvílærara skipanin, lærararunum betir møguleikar at samskifta við og um barnið. Á henda hátt koma lærararnir at kenna tørvin, barnið hevur brúk fyri.

**Eftirútbúgving**
Í tíðindaskrivinum stóð eisini at lesa, at lærarar skuldu hava góðar møguleikar at eftirútbúgva seg.
Bæði foreldur, næmingar,l ærarar og leiðslur vita hvønn týdning tað hevur, at lærarin er væl fyri at undirvísa. Kennir lærarin seg tryggan í lærugreinini, torir hann at tillaga undirvísingina eftir hvørjum einstøkum flokki. Ein slík tillagan ger, at undirvísingin verður áhugaverd hjá næminginum. Ein áhugaður næmingur er ein góður næmingur. Ein góður næmingur trívist í skúlanum. Ein næmingur, sum trívist, hevur glað foreldur. Glað foreldur virða skúlan. Ein virdur skúli hevur viðurkendar lærarar. Viðurkendir lærarar tora at tillaga undirvísingina eftir einstaka flokkinum. Á henda hátt skapa góðir eftirútbúgvinga rmøguleikar jaligar ringrásir í fólkaskúlanum.
Eftirútbúgving er eisini týdningarmikil fyri samskiftið millum lærara og næming.
Endurnýggjar lærararin ikki sína vitan javnan, er stórur vandi fyri at hann ikki fær ført eina viðurkennandi samtalu við næmingarnar. Stutt sagt tí lærarar og næmingar ikki prátar sama mál.

**Egnir fjarðar**
Summir av samgongulimunum hava í síðstuni verið í so fjaðursárir. Teir eru samdir um tað mesta, og fyri at hoyrast úr mongdini, eru teir farinir at minna hvønn annan á hvør segði hvat fyrst. Fyri at binda um heilan fingur, fari eg at enda hesa grein við at vísa á vallyftini Javnaðarflokkurin hevði til síðsta val. Teir lovaðu undir yvirskriftini Dygd í fólkaskúlanum, at Tvílæraraskipan skuldi setast í fyrsta flokk og at verandi lærarar skulu fáa góða eftirútbúgving.
Tað fjálgar, at tit sjálvt í krepputíðum halda orð.

# Betri pensjón?

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN



Nakkahárini reisast hvørja ferð talan er um eldru fólkini í Føroyum. Vaksandi talið á pensjonistum eins væl og tørvurin á ellis -og r øktarheimsplássumplássum hevur verið hvørjum mansbarni greitt í ártíggju. Allir flokkar hava sitið í samgongu tey árini og er hetta tí ein felagsábyrgd, og allir flokkar mugu sigast at hava durvað um ikki sovið í mun til hetta økið.
Vit vita, at eitt uppskot er ávegis sum ein nevnd undir fíggjarmálaráðnum hevur arbeitt við í longri tíð. Við støði í hesum umframt hugburðin hjá Tjóðveldi var uppskot til samtyktar í farnu viku um framtíðar pensjónsviðurskiftini.

**Her og nú politikkur**
Minnist, at vit í tinginum kjakaðust um samhaldsfasta í heyst. Onkur meinti, at inngjaldið ikki mátti hækkast, men at útgjaldið skuldi hækkast munandi beint nú. Tá eg so spurdi: ”Hvussu skulu komandi ættarlið fáa gagn av samhaldsfasta – um hann verður tømdur nú?” Var svarið: ”Bergtóra hugsar um seg sjálva. Men tað mugu Bergtóra og hennara ættarlið finna út av til ta tíð. Eg hugsi um tey sum eru gomul nú!”
Pínligt – eftir mínum tykki. Men samstundis eitt týðuligt dømi um, hvussu føroyskur politikkur mangan er.
Vit síggja tað á øllum brøgdum – fyribyrgjandi arbeiðið í mun til tey eldru, lívmóðurhálsvaksinan, dagtilhaldið, familjudeildin, barnatelefonin og eg kundið hildið áfram – men veruleikin er, at vit tykjast ikki at hugsa longur enn dagin í dag. Skal alt bara vera valagn?

**Nær kemur uppskotið?**
Uppskotið byggir í stóran mun á faktuellu vitanina, vit hava frá serføðingabólkinum hjá Fíggjarmálaráðnum. Tá eg kom á ting fyri góðum ári síðani skilti eg, at pensjónsuppskot var ávegis, í summar at tað kom tíðliga í heyst, í heyst at tað kom úm árskiftið, í januar at tað kom í vár. Nú sigst, at tað verður borið niðan í tingið á ólavsøku! Leingi er tað ið væl skal verða?!

**Serfrøðingarnir vísa á at**
Fleiri og fleiri eldri verða í mun til arbeiðsført. Í 2007 vóru 6500 føroyingar yvir 65 ár og í 2050 verða 13000 yvir 50 ár. Eisini siga serføðingarnir, at onnur hvør genta sum verður borin í heim í dag fer at gerast 100 ár! Eyðsæð er tískil, at útreiðslur til eldrarøkt og pensjónir økjast munandi.
Færri á arbeiðsmarknaðinum merkir minni skattainntøkur, og landskassin fer ikki longur at kunna røkja sínar skyldur ella kunna fíggja pensjónir og røktartænastur á sama hátt sum í dag. Ja, flestu okkara halda ikki at tænasturnar, sum eru í dag, eru nóg góðar í fleiri førum.

**Broytingarnar er hesar:**
Áheitanin hjá tjóðveldi við hesum uppskoti til samtyktar er, at vit heita á landsstýrið um at fyrireika eitt lógaruppskot at leggja fyri tingið, sum er grundað á semju millum politisku flokkarnar umframt partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Talan verður um grundleggjandi broytingar í pensjónsrættindum. Sjálvsagt skal verða talan um eina skiftistíð. Hesar eru meginreglurnar:
• almennu pensjónirnar og løggáva skulu tryggja øllum eina sømiliga minstupensjón
• lógarkravt verður, at øll á arbeiðsmarknaðinum og tey sum fáa ALS ella almannaveitingar hava eina eftirlønarskipan, sum verður goldin út mánaðarliga øll pensjónsárini
• ásettar verða skiftisskipanir, ið kunnu eggja fólki til at umleggja avtalaðar arbeiðsmarknaðareftirlønir, ið ikki lúka treytirnar um mánaðarligt útgjald
• Tað almenna skal í mestan mun fíggja tey, ið ikki hava aðra pensjón
• pensjónsaldur og skattafrádráttir av pensjónsuppsparing verða endurskoðað
• Betri møguleiki at verða longri á arbeiðsmarknaðinum og at forvinna pening afturat pensjónini.

**Eru broytingarnar neyðugar?**
Øllum stendur greitt, at neyðugt er sum skjótast at finna semju um broytingar á pensjónsøkinum.
Sum ein arbeiðsbólkurin hjá Fíggjarmálaráðnum hevur víst á, eru týdningarmiklar fíggjarligar og sosialar orsøkir til tess:
• Nógv hava eina persónliga eftirlønaruppsparing, td. sum part av eini starvssetan
• Feløgini á arbeiðsmarknaðinum liggja millum 6 % og 18 %, meðan summi einki hava
• Tær flestu skipanirnar eru bert nøkur fá ár
Stættarmunurin millum pensjónistar økist tí alsamt. At tað almenna rindar somu grundarupphædd í fólkapensjón og sama útgjald úr Arbeiðsmarknað areftirlønargrunninum til allar pensjónistar, bøtir onki um sosiala ójavnan.
Tískil verða miðini fyri einum pensjónsreformi at tryggja teimum, ið onga aðra eftirløn hava, eina sømiliga minstupensjón, meðan tey, ið hava eina góða arbeiðsmarknaðareftirløn, fáa væl minni frá almennu pensjónunum. Trýstið á vælferðarskipanir og almenn kassarnar fer bert at økjast komandi árini.

**Kvinnurnar ússaligast pensjón**
Vert er at nevna, at serliga kvinnurnar vera harðast raktar nú og komandi árini, sum er. Tær liva væl longri enn menn, og nógvar av pensjónunum verða bert útgoldnar í nøkur ár. Harnæst er arbeiðsmarknaðarp ensjónin oftast tengd at, hvussu nógvar tímar og ár, tú hevur arbeitt. Kvinnurnar spara vanliga ikki so nógv upp sum menn, lutvís tí at tær ikki spara upp undir barsilsfarloyvinum og lutvís tí tað oftast er kvinnan, sum arbeiðir niðursetta tíð nøkur ár, meðan børnini eru smá – og ikki minst er inntøkan hjá føroyskum kvinnum ein triðing lægri enn hjá monnunum, og tað merkir aftur minni pensjónsuppsparing.

**Betri familjupolitikk**
Vegna ójavna býtið millum yngri og eldru ættarliðini verður framyvir sanniliga eisini týdningarmikið við einum skilagóðum familjupolitikki. Einum politikki, har vit eggja ungu familjunum til at fáa børn. Hækkaðan barnafrádrátt, longt barnsburðarfarloyvið, lutaíbúðir, øll rætt til barnsins fyrsta sjúkradag. Og sjálvsagt javnbjóðis møguleikar hjá øllum familjum – eisini teimum, sum eru stakir uppihaldarar. Annað nýtist ikki at útiloka hitt.

# Landsstýrið tekur matin úr munninum á teimum eldru

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri í Tórshavnar kommunu



Tá dagtilhaldini við einum pennastroki vórðu strikað av fíggjarlógini, var tað eitt so ógvusligt inntriv í trivnaðin og gerandisdagin hjá okkara eldru, at fáur mundi vænta, at tað kundi gerast stórt verri. Men nú stendur døgurðaútkoyringin fyri skotum og verður skerd við meiri enn einari helvt.
Í Tórshavnar kommunu hava vit í mong ár havt eina frálíka skipan, har døgurði av Lágargarði verður koyrdur heim til pensjónistar. Fleiri av teimum eldru búgva einsamøll heima og hjá teimum er tað ein stórur lætti, at tey fáa døgurðan koyrdan til dyrnar, so tey bara skulu hita hann upp og fáa sær.
Men nú gongur sjón fyri søgn, at landið heldur ikki unnir okkara eldru at fáa mat í munnin. Almannastovan hevur stig fyri stig minkað stuðulin til døgurðaútkoyringina so nógv, at í ár eru pengarnir til útkoyring av døgurða til okkara eldru skornir niður um helvtina av tí, tað kostar at koyra út ella at røkja hesa borgaratænastu, sum er alneyðug hjá umleið 100 pensjónistum, sum ikki sjálvir eru førir fyri at útvega ella gera sær døgurða.
Stuðulin til útkoyringina er minkaður við 116.000 krónur frá 2008, og tí hevur Lágargarður ikki longur møguleika at koyra døgurðamat út til tey eldru, men noyðist at gevast við hesi tænastu, áðrenn árið er úti. Ikki hava tey á Lágargarði heldur loyvi til at taka peningin frá rakstrinum, so tí hava tey sent Tórshavnar kommunu eitt neyðarróp, tí tey síggja, hvønn veg tað gongur.
Hetta er enn eitt dømi um stórt ábyrgdarloysi frá landsins síðu, har sektin liggur á, hvør situr eftir við svartaperi, bara nakrar landskrónur verða spardar. Henda nýggja landsskerjingin gongur beinleiðis út yvir tey eldru í Tórshavnar kommunu, sum fyri bert fáum mánaðum síðani fingu ein skelk, tá landsstuðulin til dagtilhaldini varð strikaður við einum pennastroki.
Hóast leiðarar á dagtilhaldum kring alt landið greiddu frá einari sólskinssøgu fyri og aðrari eftir um, hvussu stóran týdning tilhaldini hava sum fyribyrgjandi tiltak og sólarglotti í gerandisdegi teirra eldru, var landsstýriskvinnan í almannamálum ikki til at vika, men helt fast við, at hesum mundu kommunurnar nokk fara at finna útav.
Takk skalt tú hava! Nú er ætlanin hjá Rósu Samuelsen, sum hevur evstu ábyrgd av Almannastovuni, at Tórshavnar kommuna enn eina ferð at taka upp eftir landsstýrið, sum tveitir frá sær, tá harðast leikar á. Hvat síggja tit fyri tykkum? Hava tit slett onga virðing fyri teimum eldru? Hvørjum líkist tað, at komið verður við einum inntrivi fyri og øðrum eftir, ið øll beinleiðis ganga út yvir tey eldru? At løgmaður situr passivur á ovastu trúnu og letur alt hetta um seg ganga, eri eg sera bilsin um!
Politiskt er hetta ein glíðibreyt, ið slett ikki kann góðtakast, tí hvat verður tað næsta? Samstundis sum tvíhildið verður um, at landsstýrið skal taka sær av eldraøkinum, verður ein partur fyri og annar eftir tveittur yvir á kommunurnar, ið noyðast at taka upptakið, tí landsstýrið hvørki hevur hugin ella viljan til at røkja eldraøkið, sum tað annars hevur bundið seg til, so leingi hetta øki er landsmál!
Skulu okkara eldri nú sjálv – av síni framman undan ússaligu fólkapensjón – rinda fyri útkoyringina? Hvat við at fingið skil á hesum, góða Rósa Samuelsen? Eingin kann liva við, at hetta heldur fram, sum tað nú ger!